**Taðing á gomlum bø**

Í 2009 byrjaði ein roynd, har gamal bøur varð taðaður við ymiskum nøgdum av handilstøðum. Royndin bleiv endurtikin í 2010 á somu stykkjum og við somu nøgdum, og ætlanin er, at royndin skal halda fram í nøkur ár. Stykkið verður sligið tvær ferðir. Royndarstykkið er býtt upp í 18 puntar. Taðað verður um várið og aftaná fyrra slóttur við seks ymiskum nøgdum hvørja ferð. Fyrru ferð ávikavist 0, 40, 80, 120, 160 og 200 kg N/ha. Seinnu ferð 0, 16, 32, 48, 64 og 80 kg N/ha.

Miðal av úrtøkuni í 2009 og 2010 er víst í stabbamyndini. Viðmerkjast skal, at stykkið hevur verið taðað hvørt ár, og tøð frá undanfarnu árum eru enn virkin. Hetta merkir, at tey fyrstu árini brúkar grasið á teimum ótaðaðu puntunum burturav gomlu tøðunum og kemur tí væntandi at vaksa meira tey fyrstu árini, men sum frálíður kunnu vit vænta, at vøksturin minkar.




Fyri at fáa eina mynd av hvussu nógv vit fáa burturúr tøðunum, hava vit roknað út hvussu nógv gras fæst burtur úr hvørjum kg av N. Hetta er víst í myndini niðanfyri.


FE/kgN
70
60
50
40
30
20
10
0
56kgN
112
168
224
280
FE/kgN